Lagt til rættis: Rógvi Nybo, rogvi@sosialurin.fo

# Næsta umfar av FM’08 í Reinsarínum

**Leygarkvøldið 29.november hevði aftur fitt av fólkið leita sær oman í Reinsaríið í Tórsgøtu til næsta innleiðandi umfar av tónleikakappingini FM´08**



Tungmálmsbólkurin Collapse úr Eysturoy er millum finalistarnar

Næsta innleiðandi umfar av tónleikakappingini FM’08 var um vikuskiftið.

Bólkarnir, sum luttóku hesuferð, vóru Reverb, Serenity, Collapse, Moustache, Fatigue, Jónsvein og Aranea.

Aftur hesuferð kann sigast, at bólkarnir, sum trinu á pall leygarkvøldið, vóru rættuliga »grønir«. Tó vóru eisini bólkar, sum luttóku í tónleikakappinigini GBOB her fyri, eitt nú Jónsvein og Collapse.

Omanfyri eitthundrað fólk høvdu leitað sær oman í Reinsaríið leygarkvøldið, og var aldursbólkurin rættili blandaður, eins og hann var til fyrsta innleiðandi umfar.

3 bólkar skuldu kappast um at koma víðari í finaluna, og dómararnir hetta kvøldið valdu Eysturoyar tungmálms bólkin Collapse, instrumentala rokkbólkin Moustache úr Tórshavn og dreymapoppbólkin Reverb, eisini úr Tórshavn.

Finalan verður hildin leygarkvøldið 6.desember klokkan 20 í Reinsarínum og tá fara 6 bólkar at kappast um at gerast Føroya besti nýggi bólkur. Teir bólkarnir eru Moby the Pink Pilot, 3st (úttalast Thirst), Oniontree, Reverb, Moustache og Collapse.

Vinnarin av kappingini fær ein fornemman vinning, og tað er 5 dagar í studio, umframt at bólkurin sleppur at spæla á Summarfestivalinum 2009 og Føroya festivalinum 2009.



*Fitt av fólki hevði leitað sær oman í Reinsaríið leygarkvøldið*







